*»Eg ivist onga løtu í, at endamálið hesum skrivi einvíst er at chikanera limir í Kappingarnevndini«* *Rúni Heinesen, limur í Kappingarnevndini hjá FSF, sum hevur fingið bræv um møguligt endurgjaldskrav*

SAMBAND
JAKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

ÍTRÓTTUR

# Beinleiðis chikana

**Rúni Heinesen sigur seg ikki ivast í, at endamálið er at chikanera nevndarlimir, nú hann saman við Karl Vidtfeldt er hóttur við persónligum endurgjaldskravi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru nú hálvt annað ár síðani, at Rúni Heinesen varð valdur í nevndina hjá FSF. Síðani hetta hevur hann verið limur í kappingarnevndini, men at hann skuldi upplivað slíkt bræv, sum tað hann nú hevur fingið, sigur hann seg aldrin hava droymt um.

– Tað hevði eg so ikki. Og eg hevði so heldur ongan tíð roknað við, at vit komu í eina støðu, har kappingarreglurnar fyri fótbólt ikki rukku.

– Sjálvur haldi eg tó, at vit hava okkara upp á tað reina. Vit hava handlað sambært teimum reglum og viðtøkum, sum vit hava at halda okkum til, og tí virkar tað fullkomuliga skeivt, at ein slík hóttan nú verður sett móti okkum.



*Rúni Heinesen ivast ikki í, at hann hevur handlað rætt. Men hann tykist væl og virðiliga irriteraður um, at hann og Karl Vidtfeld skulu »chikanerast«, sum hann málber seg*

**Chikana**
Men skal HB seta endurgjaldskrav fram, skulu teir væl dokumentera ein inntøkumiss. Kann tað í sjálvum sær ikki verða trupult hjá teimum?

– Tað er tað kanska, men tað er so ikki mítt borð. Men eg ivist onga løtu í, at endamálið hesum skrivi einvíst er at chikanera limir í Kappingarnevndini, soleiðis at onkur møguliga hoyknar í kongunum, staðfestir Rúni.

**Missir ikki náttarsvøvnin**
Hóast hann soleiðis kennir seg hóttan og/ella chikaneraðan, so sigur Rúni Heinesen tó at enda, at hetta ikki er nakað, sum hann gongur og hugsar stórvegis um.

– Eg missi ikki náttarsvøvnin av hesum. Nú veit eg ikki, hvussu slík mál vanliga skulu grípast an, men eg eri vísur í, at vit ikki hava gjørt nakað skeivt. Vit hava handlað eftir teimum reglum, sum vit eru valdir at umsita, og meira er ikki at siga um tað, staðfestir Rúni.

# HB-dómurin avsagdur seinnapartin

**Rætturin skuldi seinnapartin í dag at gera av, hvørt fútaforboð skal setast móti at EB/Streymur og VB/Sumba spæla fjórðingsfinalu í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vegna ávíkavist HB og FSF hava Ingi Højgaard og Páll Nielsen, advokatar, í dag roynt at ført fram sínar grundgevingar fyri og ímóti fútaforboðnum.

HB hevur áður sagt, at teir meta sína sak vera í vanda, um málið sleppur at glíða út. Og tað meta teir, at tað ger, um dysturin verður spældur.

FSF førir hinvegin fram, at HB ikki hevur haldgóða orsøk at krevja fútabann. Bæði tí hetta ikki er í tráð við fyrisitingarlógina, og tí teir siga, at HB ikki hevur nakað at óttast. Hetta tí FSF sigur, at kemur Ítróttardómstólurin til eina aðra niðurstøðu enn hana, sum FSF sjálvt er komið til, so sleppur felagið sjálvandi at spæla sín dyst sum ætlað.

Hvør úrskurðurin verður, var ikki greitt við evstamark okkara, men klokkan 14 hevur dómarin innkallað partarnar aftur, og verður dómurin ætlandi avsagdur tá.



*Talan er mest sum um søguliga hending, nú eitt kappingarmál í fótbólti fyri fyrstu ferð í 25 ár endar í rættinum*

STUTT SAGT

## HB hóttir nevndarlimir í FSF

**Í brævi umvegis sakførara tekur HB fyrivarni fyri, at talan verður um endurgjaldskrav móti tveimum av limunum í Kappingarnevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Brævið, sum sakførarin, Jógvan Páll Lassen, hevur sent vegna HB, er stílað til teir báðar limirnar í Kappingarnevndini, Rúna Heinesen og Karl Vidtfeldt.

– Felagið kann ikki tulka hetta øðrvísi enn ein óreinan máta at skúgva tey rættindi, sum Havnar Bóltfelag møguliga hevur, til viks, og á henda hátt við tykkara avgerð at gerae tykkum inn á Havnar Bóltfelag, verður sagt í skrivinum.

Sakførarin endar skrivið við at siga, at HB longu nú tekur fyrivarni móti at gera teir báðar nevndarlimirnar persónliga endurgjaldsábyrgdaðar í sambandi við avgerðir teirra í málinum. Tøl verða ikki nevnd, men møgulig UEFA-Cup luttøka verður nevnd sum endurgjaldsgrundarlag.

Rúni Heinesen, sum er næstformaður í Kappingarnevndini, hevur avgjørdur afturvíst skrivinum.

– Vit hava fult og heilt grundað okkara avgerðir á Kappingarreglarnar og siðvenjur hjá Fótbóltssambandinum. Hesum meta vit, sum eru valdir av aðalfundinum hjá FSF, at vit hava skyldu til at fylgja. Somuleiðis skulu vit gera vart við, at Dómsnevndin hjá FSF er komin til somu niðurstøðu sum Kappingarnevndin og at sambært grein 42 í Kappingarreglunum eru avgerðirnar hjá Dómsnevndini endaligar, skrivar hann í svarskrivi.